## DAGSINS MEINING

# PISA - eitt ódnartak fyri framman

Tað er ikki á hvørjum degi, at føroyski skúlin vekir alstóran áhuga og skapar mikla røring í øllum samfelagnum. Men PISA kanningin gevur eina so dapra mynd av støðuni í føroyska skúlanum, at ein illa fær seg til at trúgva kanningini. Myndin fevnir um tey fimtan ára gomlu og vísir hon sum kunnugt, at tað stendur heilt illa til við lesiførleika, støddfrøði og náttúrlærugreinum. Hóast tað kunnu vera ymisk brek við kanningini, sum gera, at hon avmyndar støðuna nakað verri, enn hon veruliga er, so skerst ikki burt, at føroyski fólkaskúlin er vorðin eftirbátur, um samanborið verður við grannalondini. Hetta verður enntá staðfest, júst sum vit standa á einum altjóða vegamóti, har tørvurin á góðari skúlagongd ongantíð hevur verið størri.

Hvat er nú til ráð at taka? Her má nakað gerast, men samstundis má ansast eftir, at vit frá nú av bera okkum rætt at. Eitt er vist: tað bøtir ikki um støðuna, um farið verður at jagstra syndabukkar. Tað er eisini púra óneyðugt, tí vit eru øll undir ákæru. Land og kommunur hava ikki givið fólkaskúlanum nóg stóran ans. Her verður bara talað um miðnámskúlar og hægri skúlar. Kommunurnar spara uppá undirvísingartilfar. Landið ger ov lítið fyri at framleiða gott og tíðarhóskandi undirvísingartilfar. Flestu foreldur munnu uppliva, at børnini sita við somu bókum, sum tey sjálvi sótu við fyri árum síðan. Samstundis mugu mong foreldur taka í egnan barm og ásanna, at tey ikki fylgja nóg væl við, at tey ikki samstarva nóg væl við skúlan, og at tey lata børnini yvir til teldu, video og sjónvarp. Heldur ikki lærarin gongur fríur, sum formaður Lærarafelagsins longu hevur ásannað alment.

Landsstýrismaðurin hevur higartil megnað at halda høvdið kalt, og tað eigur hann at halda fram við, um málið sum fráliður fer at elva til øsing. Onkur er longu farin at røra í pottinum, og tað er sjálvsagt freistandi, men tað gagnar ongum og so slættis ikki skúla og børnum. Vit hava øll eina ómetaliga stóra ábyrgd í hesi støðu, sum øll innast inni hava havt ein varhuga av. Nú er at leggja til brots fyri at bjarga tí, sum bjargast kann. Men tað nyttar lítið at loypa framav. Nú mugu vit bíða eftir tí atgerðarætlan, sum landsstýrismaðurin hevur fráboðað verður gjørd. Tá hon so verður løgd fram fyri løgting og almenning, so mugu allar góðar kreftir savnast til tess at fáa broytt støðuna til tað betra.

Tað eru tíggju ár, til vit skulu verða millum heimsins fremstu tjóðir – ikki minst á útbúgvingarøkinum. Hetta krevur nýhugsan, hetta krevur, at nógv halgineyt verða tikin av døgum í øllum løgum innan skipanina. Hetta krevur ein veldugan innsats frá Løgtingi, landsstýrismanni, fyrisiting, lærarafelagi, skúlum, kommunum og foreldrum. Hetta fer ikki minst at krevja øktar játtanir og at tilfeingi verður sett av til at framleiða gott tíðahóskandi lærutilfar, at bøta um skúlabygningar, til eftirútbúgving og ikki minst til ein endurnýggjaðan lærara-skúla. Um lands- og kommunalpolitikkarar ikki ásanna hetta, og skattgjaldarin ikki gloymir alt um skattastopp, so kunnu vit eins væl leggja árarnar inn beinanvegin. Fólkaskúlin allur sum hann er og lærarskúlin skulu endurreisast frá grundini. Her skal takast eitt ódnartak, sum fer at kosta bæði so og so. Taka vit ikki hetta takið, so fer tað at svíða til framtíðina og tað kann gerast so dýrt, at vit ikki rísa undir tí. Tá verður eisini ringt at liva upp til Visón 2015, sum hetta landsstýrið hevur sett út í kortið.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvør stýrir hvørjum?

**HERGEIR NIELSEN**
løgtingsmaður



Tíðindaleiðarin í útvarpinum, Johan Mortensen, sigur seg ósamdan í hugsan míni um, at útvarpið og Tinganes eru undir felags stýring.

Hann skal eiga takk fyri viðmerking sína, men ikki kann sigast, at tað eyðnast honum at burturvísa sakligu atfinningunum í greinini um afturundirgerðina í altjóðagerðini.

Sjálvandi eigur almenni tíðindaleiðarin at harmast, um politikkarar skuldseta tíðindafólk hansara fyri at verða stýrd av politiska valdinum.

Soleiðis var tað nú heldur ikki gjørt í hesum føri.

Skuldsetingar mínar vóru heftar at stovninum sjálvum og dagliga tíðindaflutninginum haðani, sum tíverri er merktur av, at Sortudíki tænir Tinganesi meiri enn gott er.

Tí lá tað nær at skriva um felags stýring.

Dømini eru so mong, og takast kann uppaftur, at tøgnin í eini longri røð av løgtingsmálum, skrivligum og munnligum fyrispurningum okkara, tíverri prógvar hesa gongd

Taka vit onnur mál, sum vit ikki sjálvi bera flokspolitisku kannuna av, so er skilið tað sama.

Vit fingu td. tvær sera atfinningarsamar kanningar frá landsgrannnskoðanini í vetur.

Tann fyrra, um frávik millum játtan og nýtslu hjá landskassanum, kom í oktober 2005, og tann seinna um at grannskoða einskiljingar, kom í januar 2006.

Báðar hesar frágreiðingar vóru sera atfingingarsamar móti landsins stýri.

Tær høvdu fingið parlamentariskar fylgir og elvt til nógvan orðadrátt í øllum øðrum framkomnum samfeløgum.

Men - líka so atfinningarsamar og líka so kolldømandi hesar frágreiðingar vóru, líka so tigandi var Sortudíki.

Um tingmaður nú ivast og klívur í tvey ella sóknast eftir, hví so er, so fær hann av at vita.

Tíðindaleiðsluni í Sortudíki, sigur at:

"Hetta er at undirmeta og misteinkiligera hesi fólk, sum øll halda seg burtur frá politiskum flokkum ella arbeiði, sum kann skaða trúvirðið í tíðindaarbeiðnum."

Álop er besta verjan, og tíðindaleiðarin hopar her við sjeymálafetum undan ábyrgd síni.

Í staðin fyri sakligar afturvísingar velur hann at skuldseta eina kristiska rødd fyri persónliga forfylging av starvsfólkum sínum.

Hetta var betri óskrivað.

Heldur leiðslan í Sortudíki seg sleppa at múlabinda lurtaran við at skuldseta hann fyri persónliga forfylging, so heldur hon seg ivaleyst eisini liva í einum totaliterum samfelag.

Hetta er hinvegin minni gott fyri okkum onnur, sum halda okkum liva í einum opnum demokratiskum samfelag.

Tíðindaleiðarin sigur víðari:

"At málið hjá Hergeiri Nielsen "Uppskot til samtyktar um EFTA og ræði av málum og málsøkjum" er druknað í stóru málsrúgvuni upp undir tingsetulok, tá atkvøtt varð um málið uttan at álit var skrivað, er spell."

Álvaratos, harra tíðindaleiðari.

Løgtingsmálið um EFTA varð lagt fram 28. februar og tingsetan endaði 5. mai. Tað var nr. 70 av 116 løgtingsmálum, og lá sum soleiðis ímiliga langt frá druknideyðanum í útvarpinum.

Nei, aftur her noyðast vit at halda fast um, at Sortudíki rennur ørindi fyri Tinganes.

Málið er sera nívandi og keðiligt fyri eina samgongu, sum sigur seg hava eina heilt serliga visjón í altjóðagerðini.

Visjónin um at teljast millum heimsins fremstu lond við bindi fyri eyguni og loki fyri oyruni, átti at veri ein sannur gloypibiti fyri útvarp okkara, men so eiðasørt.

Ein kritisk rødd í einum frælsum útvarpi hevði havt jóladagar í øllum øðrum londum.

Hon hevði ligið í andvekri, til hon hevði fingið svar uppá, hví landsins stýrið ræðist eina samtykt um, hvørjum tað skal stevna eftir.

Eitt er, at tað almenna útvarpið brúkti úti við tveir mánaðir at koma eftir, at eitt størri tingmál lá til tingsins viðgerð.

Annað er, at útvarpið køvdi tíðindini um lagnuna hjá hesum máli við eins tryggari hond, sum landsstýrið køvdi samtyktina í tinginum.

Tá so er, er hugsandi, at vit onkustaðni fáa fyrigeving fyri illavorðnu hugsanum okkara, um nú Tinganes er stýrt úr Sortudíki, ella Sortudíki er stýrt úr Tinganesi.

# Heilsan til heimbygdina Leirvík



Nú undirsjóðartunnilin opin er
Tja lalala lalala
Og ferðslan fer við rúkandi ferð
Tja lalala lalala

Men í bygdum øki 30 km/t er
So har koyrir ferðslan við hóvligari ferð

Nú fløggini eru á húnar hátt
Og øll eru vælkomin á hvørja gátt

Til Leirvíkar at bowla vit fara ein túr
Og búffarnir teir smakka fram úr

Bygdarhúsið flott og stórt
Dámligt tað er til veitsluhøll

LÍF ítróttarhúsið er
Sjavskapping eisini har fram fer

Og skótahúsið eisini er
So børn og ungdómur samlast her

Kirkjan so prýðilig stendur her
Og onnur samkomuhús eru h er

Fiskahús, bátar og skip
Uttan tey er eingin bygd

Brennistøðin er úti á vík
Har nógv er at brenna og annað slíkt

Nú hendan vísan at enda komin er
Má Gud signa tey ið búgva her

**Kata Elisabeth Mortensen**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.